# Fremad Amager tapti í Brøndby

Tað gongur av skriðuni hjá Fremad Amager í løtuni. Í gjár vitjaðu teir eykaliðið hjá Brøndby, og tapti Fremad 3-0 eftir hálvleiksstøðuna 1-0. Samstundis vann nærmasti biðilin til 2. plássið, Brønshøj 2-0 á heimavølli ímóti Stenløse. Roskilde vann 3-1 á Slagelse á heimavølli, og liggur Roskilde nú langt fremst í 2. deild eystur. Roskilde hevur 55 stig, Fremad Amager 48 stig, Brøndby2 46 stig, og Brønshøj hevur 45 stig.



# Gravesen liðugur í Everton

Enska felagið Everton leigðai í fjør Thomas Gravesen úr skotska felagnum Celtic, har Gravesen hevði trupult við at koma á liðið. Tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá Gravesen í Everton, har hann hevur sitið nógv á beinkinum. Nú er leigumálið liðugt, og Everton letur Gravesen fara aftur til Celtic, har áhugin fyri at taka ímóti Gravesen ikki er tann størsti, sigst.

## HB og B36 skiftast

**HB og B36 hava sent hvørt annað líka ofta út steypa-kappingini síðan 1990**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Dystirnir hava ofta verið tættir, tá grannarnir í høvuðsstaðnum, HB og B36, hava hitst í sokallaðu ´knock-out dystunum í steypakappingini. Fýra ferðir hava teir reyðu og svørtu enda omaná, meðan sigurin í gjár eisini var tann fjórði í røðini hjá árstalsfelagnum. Hetta síðan 1990.

**1991, finala:**
HB – B36 0-1
Bergur Magnussen

**1996, fjórðingsfinalan:**
B36 – HB 1-4
Jørgen Meitelberg – Uni Arge (3), Rúni Nolsøe

**1998, hálvfinalur:**
HB – B36 4-1
B36 – HB 2-2

**2000, fjórðingsfinalan:**
B36 – HB 2-2
HB vann brotsparkskapping 3-6
Bjarni Prior, Ronnie Samuelsen – Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe

**2001, hálvfinalur:**
B36 – HB 3-1
Jákup á Borg, Jan Guttesen, Pól Thorsteinsson – Hallur Danielsen
HB – B36 1-0
Pætur Dahl

**2002, fjórðingsfinalan:**
HB – B36 3-0
Uni Arge (2), Rúni Nolsøe

**2008, hálvfinalur:**
B36 – HB 0-0
HB – B36 1-2
Andrew av Fløtum – Karoly Potemkin, Tamás Nagy

# Bara eitt stig til Suðuroyar

**Níggju stig og málmunurin 18-1 í trimum teimum seinastu umførunum hava borið við sær, at 07 Vestur nú er á uppflytingarplássi saman við VB/Sumba**

FÓTBÓTLUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Í Gundadali misti VB/Sumba fyri fyrstu ferð hetta kappingarárið stig, tá teir spældu móti einum væl mannaðum og uppløgdum HB-liði*
*Mynd: Einslistir*

Eftir at tað tey fyrstu umførini gekk sum eftir ánni hjá teimum báðum Suðuroyar feløgunum er rættuligur stígur komin í hjá TB. TB tapti hesa ferð tepurt á Argjum, og tað ber við sær, at TB einki hevur fingið burturúr trimum teimum seinastu umførunum. Harvið er TB dottið niður um uppflytingarplássini.

AB vann 1-0 við máli, sum Dion Splidt skoraði beinleiðis upp á horna úr høgru. Senegalesiski Joseph Bassene hjá TB og seinni Dion Splidt hjá AB sendu bóltin á trækarmin. Serliga heimaliðið hevði málmøguleikar, uttan at mál spurdust burturúr hjá nógvu ungu monnunum á Argjum.

Í Gundadali vitjaði VB/Sumba teir næstbestu hjá HB, og fyri fyrstu ferð í ár vann VB/Sumba ikki fulla úrtøku. Talan var um fínt undirhald og framúr mál. Ikki minst tá ið Hendrik Rubeksen við fínum lobbara upp um Bjarna Johansen økti til 3-1. Tað boðar frá góðum morali, at VB/Sumba tvær ferðir megnaði at reisa seg, hóast HB var á odda við tveimum málum.

Tað gekk striltið hjá 07 Vestur at fáa hol á í góðveðrinum á Svangaskarði. Nógvu vágafólkini á áskoðaraplássunum vóru farin at ótolnast, og tí var frøin stór, tá ið tað glapp, og so gekk skjótt í 2. hálvleiki. Serliga liðformaðurin, Tór-Ingar Akselsen, var væl upplagdur í vinstra borði, har uppspælið til flestu málini var.

Hálvskaddi Kim Poulsen varð settur á vøllin beinanvegin eftir steðgin. Hann skoraði tvær ferðir eftir returbóltar í brotsteiginum, og so fór hann skaddur av vøllinum. Andrzej Stretowicz økti til 3-0 við stútara eftir frísparksinnlegg frá Tór-Ingari, og tá ið hann økti til 4-0, lyfti hann bóltin aftur um seg sjálvan og B68 málverjan Alberg Gaardlykke. Innskifti Sjúrður Ellefsen staðfesti rimmar sigurin við langskoti. Hetta var fyrsti útisigurin hjá 07 Vestur, sum higartil bara hevur spælt tvær ferðir á útivølli. Í fyrru útivallar royndini taptu vágamenn 4-0 á Sevmýri.

Í trimum teimum seinastu uppgerðunum hevur 07 Vestur vunnið níggju stig við málmuninum 18-1. Tað ber pláss omanfyri uppflytingarstrikuna við sær.

NSÍ vann trý tey fyrstu stigini, tá ið teir úr Runavík vitjaðu í Streymnesi. Úrslitið var 4-1,. Unglingaspælarar skoraðu øll NSÍ málini. Aftur hesa ferð var Øssur Dalbúð tvífaldur málskjútti, meðan Pól Jóhannus Justinussen og Jann Martin Mortensen, sum var við í uppspælinum til fleiri av málunum, skoraðu hvør sítt.

Í Klaksvík fór Víkingur avstað við einum stigi, eftir at KÍ hevði verið leikliga omaná og misnýtt eina røð av møguleikum, sum Mortan Joensen vardi fyri ella sum vórðu misnýttir orsaka av óneyvleika í skotroyndunum. Tórður Lervig legði heimaliðið á odda við góðum skoti av brotsteigarmarkinum, og Sigfríður Olsen javnaði fyri Víking við góðum stútara.

# Kunnu vinna í Luksemburg

**Helst verður málmunurin avgerandi, tá seinasta umfarið hjá kvinnulandsliðnum í fótbólti er á skránni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fríðrunn Danielsen fekk sín fyrsta A-landsdyst, tá hon kom á vøllin í dystinum móti Kasakhstan*
*Mynd: www.football.fo*

Føroysku fótbóltskvinnurnar taka í hesum døgum lut í minikapping í Luksemburg.

Hini mótstøðuliðini eru Luksemburg, Letland og Kasakhstan, og higar til hevur gingið væl hjá okkara kvinnum.

Kasakhstan eigur hægst styrkismetta liðið, og áður hava Føroyar tapt tepurt móti teimum, men leygardagin spældu okkara tó málleysan javnleik. Úr Luksemburg verður sagt, at hóast føroysku kvinnurnar teknískt vóru omanfyri Kasakhstan, so fingu hesar fleiri góðar møguleikar, sum Randi Wardum í føroyska málinum tó tók sær av.

### Vunnu móti 10 lettum

Í gjár varð so spælt móti Letlandi, og her vunnu føroysku kvinnurnar 4-2 eftir at okkara vóru á odda 2-1 í steðginum.

Føroysku kvinnurnar fingu eisini annan fyrimun undan steðginum, tá málverjin hjá Letlandi fekk reytt kort fyri at steðga eini leysari Heidi Sevdal, men hóast hetta høvdu okkara trupult við veruliga at seta seg á dystin.

Móti dystarenda møddust lettisku kvinnurnar tó dekan ov nógv, og so kundu okkara seta trumf á.

Føroyskir málskjúttar móti Letlandi vóru Rannvá B. Andreasen og Elin Katrina Haraldsen, sum skutu tvey mál hvør.

Støðan undan seinasta umfarinum er nú, at Føroyar og Kasakhstan stríðast um oddasessin í kappingini. Vinna bæði sín dyst í dag, verður málmunurin avgerandi.